Marita hevur úr at gera til jólasøluna. Her er hon í ferð við at mála ein dukkuvogn, sum kanska fer at liggja innpakkaður undir onkrum jólatræi í ár

– Lutirnir hjá okkum eru allir kvalitetslutir. Teir eru heimagjørdir og eisini forkunnugir, sigur Jóna Olsen, leiðari á Varda verkstaðnum á Brekku



Verkstaðurin á Brekku:

Tey stákast til jólasølu

Í hesum døgum stákast starvsfólk og brúkarar á Varda verkstaðnum á Brekku í Klaksvík við at gera jólaprýði og gávulutir til árligu jólasøluna, sum verður leygardagin

JÓLASØLA
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo
Myndir: Jens K. Vang

Klaksvík: Á Varda verkstaðnum í Brekku hava tey verið jólalig síðani í juni mánaði. Tá byrjaðu tey so smátt at gera jólaprýði til høvuðssøluna hjá teimum, sum vanliga er í november mánaði.

Jóna Olsen, leiðari á verkstaðnum, sigur, at brúkararnir gera so at siga alt prýði sjálvi.

– Vit leggja tað til rættis frá byrjan av og onkuntíð taka vit um endan, men tey gera meginpartin sjálvi, greiðir hon frá.

Jólamenn og konur, dúkar, hillar, jóladekoratiónir, grýtulappar, borðlappar og alskyns jólaprýði, sum alt er hondgjørt, verður hongt upp ella stillað fram til jólasøluna.

Vælvitjað

Jólasølan letur upp klokkan 10 leygarmorgunin og er opin til klokkan 15. Vanliga verður alt selt, og Jóna sigur, at tað vitja ótrúliga nógv fólk.

– Vit hava okkara føstu viðskiftafólk, men tað legst eisini afturat, sigur hon.

Komandi vikuskifti er jólasølustevna í KÍ høllini eisini, men Jóna óttast ikki, at tað fer at ganga út yvir teirra sølu. Hon sigur, at fólk vita, hvat tey gera á verkstaðnum, og tí vita tey eisini, hvørjum tey koma eftir.

– Lutirnir hjá okkum eru allir kvalitetslutir. Teir eru heimagjørdir og eisini forkunnugir. Vit hava roynt at gera slíkt, sum ikki fæst aðrastaðni. Til dømis jóladekoratiónir, har vit nýta prýði, sum vit gera burtur úr tilfari úr náttúruni, greiðir Jóna frá.

Hvíla í desember

Tá jólasølan er av leygardagin, er tann strævnasti parturin av fyrireikingunum til jóla av á verkstaðnum á Brekku. Tá sølan er avgreidd, kunnu tey fara í holt við at hugsa um jólahugnan á sjálvum verkstaðnum fyri tey sjálvi.

Og tað trýtur ongantíð við jólahýrinum. Øll gleða tey seg til jóla og duga sera væl at hugna sær.

– Eg haldi ikki, at tey eru minni jólalig fyri tað, um tey gera nissur longu í juni mánaði, sigur Jóna.

Í desember skipa tey millum annað fyri jólahugna fyri avvarðandi og eisini verður farið ein jólatúr til Havnar.

Tað letur ikki til at ganga út yvir jólahýrin á verkstaðnum á Brekku, at tey longu í juni mánaði byrja at gera nissur og annað jólaprýði

Áhugaverda bókin



kemur út í vikuni

Forlagið Gráfelli

Í bókini verður sagt frá vanlukkum á sjónum í árunum frá 1950 til 1975. Eitt nú tá "Stella Argus" fórst, tá íslendski trolarin "Egill rauði", sum 19 føroyingar vóru við, fór á land, tá "Nólsoyar Páll" misti gummibát við fýra monnum, og tá "Sjøstjørnan" sakk á veg av Miðvági til Íslands í 1973. Í bókini kemur fram, at leitingin eftir manningini var tilvildarlig.

ENDURLÝSING

Verkfrøðingur til vegadeildina

Við hesum verður søkt av nýggjum eftir verkfrøðingi ella líknandi til vegadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast.

Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

Arbeiðsuppgávur
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri:
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøk
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum
- Myndugleikaumboðan

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og helst við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki.

Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

Setanarviðurskifti
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk, Postboks 78
110 Tórshavn

og skal verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 6. desember 2004. Merkið brævbjálvan "Verkfrøðingur til vegadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Finnleifi Durhuus, leiðari av vegadeildini, á tel. 31 13 33, teldupostur: fd@lv.fo

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land